Til Umhvørvismálaráðið **Tórshavn 09.05.2023**

Gongin 7

110 Tórshavn

Viðmerkingar frá Føroya Fiskimannafelag til uppskotið mál nr. 23/02452-14)

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin), Javning av framhaldandi árligari veiting av endurgjaldi fyri mist vinnuføri, og áseting um, at endurgjaldsveiting í seinasta lagi endar við fólkapensjónsaldur.

Tað var **Føroya Fiskimannafelag,** sum fyrr í ár heitti á Umhvørvismálaráðið um at fáa broytingina í lag. Talan var um at fáa ***javning av framhaldandi árligari veiting av endurgjaldi fyri mist vinnuføri.***

Talan er um tvær høvuðsbroytingar í nýggja uppskotinum:

1. At framhaldandi árliga veitingin fyri **mist vinnuføri** verður javnað við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Bati: Endurgjaldsveitingin varðveitir **sítt real-virði** í mun til lønarlagið í samfelagnum.

2. At endurgjaldsveitingin ikki heldur uppat við 67-ára aldur, men heldur tá ið tryggjaði nær tann til eina og hvørja tíð galdandi fólkapensjónsaldur samb. Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Bati: Persónar við langtíðar arbeiðsskaða ella vinnusjúku fáa altíð rætt til antin arbeiðsskaðatrygging ella fólkapensjón - har annað sleppur, tekur hitt við.

Saman um tikið: Góðir og týðandi batar fyri tey, ið verða fyri vanlukku á sjónum.

Føroya Fiskimannfelag fegnast um skjóta og góða arbeiðið í Umhvørvismálaráðnum í hesum máli.

Vinarliga

Føroya Fiskimannafelag

Birgir Waag Hagnesen